## Fyrsti sigur í hálvt ár

At tað kann vera skjótt báðar vegir, kann týska felagið Hertha Berlin skriva undir uppá. Undanfarna kappingarár var høvuðsstaðarfelagið til tað síðsta við í kappingini um gullið, men í vetur hevur liðið verið botnlið. Tá tað leygardagin eydnaðist Hertha Berlin at vinna 3-0 á Hannover 96, var tað fyrsti sigurin í Bundesliguni síðani 8. august. Ein sigur í 17 dystum munar tó í minna lagi, og enn er Hertha Berlin langt frá at bjarga sær í bestu týsku deildini.



## Rangers vardi oddasess

Við einum seinum máli frá Nacho Novo eydnaðist Glasgow Rangers leygardagin at vinna 1-0 á Hamilton, og sostatt er Rangers framvegis oddalið í skotsku Premier League. Uttan fleiri lyklaspælarar og við nógvum møguleikum til mótstøðuliðið, sum er nummar 10 av teimum 12 liðunum í deildini, megnaði oddaliðið at fáa øll trý stigini, tá Novo 12 minuttir fyri tíð var á rætta staðnum til rætta tíð og fekk sent bóltin fram við Hamilton-málverjanum.

# Dráttur vann finaluna

**Kvinnufinalan í Føroya Banka-kappingini um vikuskiftið endaði við, at Dráttur vann á Fleyr, men enn er ikki greitt, hvat av liðunum kemur í steypafinaluna. Dráttur og Fleyr skulu aftur spæla mikukvøldið, áðrenn tað er avgjørt**




**Hilmar Jan Hansen**



Kvinnurnar hjá Drátti og Fleyr skulu aftur mikukvøldið dystast, og tá verður avgjørt, hvat av liðunum sleppur í steypafinaluna ímóti SÍ
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Tað var kanska eitt sindur óvæntað, at Dráttur skuldi vinna seg heilt fram í finaluna í Føroya Banka-kappingini, sum var í Badmintonhøllini í Klaksvík seinnapartin í gjár. Fyri tað fyrsta var liðið ikki fullmannað, tá tað kom norður til Klaksvíkar leygardagin, og harnæst var spælið heldur ikki sannførandi at byrja við.

Men Dráttur kom víðari úr bólkaspælinum og megnaði so at vinna 2-0 á TB í hálvfinaluni, sum kanska var eitt tað mest óvæntaða úrslitið av øllum. Og tá tað bar til, so kundi sjálvandi alt bera til í sjálvari finaluni. Tað skuldi eisini vísa seg, at so var.

Fleyr hevði vunnið FK-kappingina fyrr í heyst, so tí var ein sigur í finaluni í gjár nóg mikið til at fáa sæti í steypafinaluni. Fleyr vann seg víðari úr bólkaspælinum við tveimum sigrum og tapi fyri TB, ið leingi sá út til at vera favorittur, men ikki rakk á mál. Tá so Fleyr í hálvfinaluni vann 2-1 á Mjølnir, sá veruliga ljóst út hjá havnarkvinnunum undan finaluni.

### Dráttur-Fleyr 3-1

(22-25, 25-22, 25-20, 25-16)

Hóast Dráttur legði fyri sum eitt óløgi og var á odda mestsum allan vegin og enntá so seint sum 21-17, gjørdist tað Fleyr, sum megnaði at koma sterkt aftur og vinna fyrsta settið í finaluni. Men sum spælið hevði gingið í fyrsta settinum, var alt púra opið enn.

Í øðrum setti kom Fleyr betur frá byrjan, hóast tað ongantíð gjørdist tann stóri munurin á liðunum. Leingi leikaði javnt á, men av tí at Fleyr ímóti endanum alla tíðina var liðið, sum var tað fyrra at leggja seg á odda, áðrenn Dráttur fekk javnað, lá tað líkasum til Fleyr. Men tá hevarin hjá Drátti, Maja Popovic, snýtti Fleyr og smasjaði í gólvið til 22-22, var liðugt hjá Fleyr, ið einki stig fekk aftrat í settinum.

Í triðja setti var uppaftur javnari, og nú fylgdust liðini alla tíðina. Serliga byrjanin var stuttligt at síggja, tí tá vóru langar duellir og kampur um hvønn bólt, so tú skuldi trúð, at hetta var eitt fimta sett. Her var Fleyr á odda so seint sum 21-19, men allíkavæl fekk Dráttur sloppið sær framvið og vunnið.

Nú var Dráttur frammanfyri 2-1, so í fjórða settinum ráddi veruliga um hjá Fleyr at koma afturíaftur, men tað eydnaðist ongantíð. Hinvegin var tað Dráttur, sum streyk avstað og eitt skifti var á odda 15-5. So kom stígur í eina løtu og Fleyr slapp at nærkast, men nærri enn fýra stig kom Fleyr ikki, og tí kundi Dráttur stinga av við sigrinum og somuleiðis gullinum í Føroya Banka-kappingini.

**Øll úrslitini frá Føroya Banka-kappingini kunnu síggjast á síðu 16**

## Ótrúliga glaðar

Tað gekk sjón fyri søgn, at kvinnurnar hjá Drátti vóru sera fegnar eftir finalusigurin á Fleyr, sum samstundis gevur teimum ein nýggjan møguleika mikukvøldið at koma í steypafinaluna.

– Hetta kennist heilt ótrúliga gott. Vit fóru norður við næstan hálvari manning, so vit høvdu ikki so góðar vónir undan kappingini. Men at vit kláraðu okkum í gjár, gav okkum trúnna á, at vit eisini fóru at klára Fleyr í dag, so nú eru vit ótrúliga glaðar, sigur Helga Nordendahl.

Hon væntar, at hálvfinalan mikukvøldið, sum aftur verður ímóti Fleyr, verður ein dystur, sum fer at líkjast dystinum í gjár.

– Eg væntí, at tað verður nakað tað sama. Fleyr hevur ein øgiligan blokk, sum vit skulu royna at sleppa framvið, men megna vit tað, so kunnu vit vinna aftur tá, sigur Helga, sum ásannar, at sigurin í Føroya Banka-kappingini eisini gevur gott mót til restina av landskappingini.

– Har eru vit eitt av fýra jøvnum liðum, sum royna at taka dystin upp við SÍ, sum er í flokki fyri seg. Vit hava ikki havt tað so lætt í ár, tí vit hava havt trupult við at mannað lið, men nú síggja vit ljósari upp á tað.

**hil**

## Vánaligar móttøkur

Spælararnir hjá Fleyr vóru vónsviknir eftir finalutapið fyri Drátti í Klaksvík í gjár, men kortini varð hildið fast um vónina at koma í steypafinaluna, sum livir enn, tí ein dystur aftrat skal spælast ímóti Drátti.

– Í dag fingu vit ongantíð móttøkurnar at rigga, og av tí sama bar einki annað til hjá okkum heldur. Eg haldi heldur ikki, at vit satsaðu nóg mikið, tí høvdu vit vunni, so komu vit beinleiðis í steypafinaluna. Vit kundu avgjørt alt í dag, men tað megnaðu vit ikki, segði Birita Joensen.

– Vit eiga at spæla nógv betur, enn vit gjørdu í dag, so tað mugu vit bara vísa mikukvøldið. Tá mugu vit royna at fáa móttøkurnar at koyra betur, so vit kunnu fáa miðjuna við, tí tað var størsti trupulleikin hjá okkum í dag.

**hil**